**Tit ringja — vit skriva**

Er nakað á vási? – Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara
Vit eru til reiðar!

**Telefon 118 20 - Telefax 147 20**

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**

Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran

**Telefon 118 20 - Telefax 147 20**

## veðrið

Rættuliga kølin luft rekur framvegis móti Føroyum norðaneftir og lagtrýstið, sum er við at taka seg upp yvir Danmarkarsundinum, rekur næstu dagarnar í landsynning.

**Leygardagin**



At byrja við bert lítið lot, men út á dagin lot upp í gul, 5-8 m/s, av landsynningi og suðri, gott sýni, nærum turt og sólarglottar. Út á kvøldið ádrigið og kanska regn. Hitin um dagin millum 7 og 10 stig, um náttina uml. 7 stig.

**Sunnudagin**

Vaksandi vindur upp í hvassan vind ella skrið, 15-20 m/s, av landsynningi, ádrigið, bert toluligt sýni og regn tað mesta av degnum. Hitin alt samdøgurið uml. 10 stig.

**Mánadagin, týsdagin og mikudagin**

At byrja við einamest úr struki upp í hvassan vind ella skrið, 13-18 m/s, eystaneftir, seinni helst minkandi vindur sunnaneftir. Framvegis ádrigið við bert toluligum sýni og regni ella regnæling. Hitin alt samdøgurið millum 7 og 10 stig.

## óli teknar

*British Petroleum*




Meðan føroyingar og danir telvast um undirgrundina, tykist eingilskmaðurin at fara avstað við henni

# Jøkul fekk sjógv

*Útróðrarbáturin var á veg heim úr Íslandi, tá hann fekk stóran sjógv*

Á heimleið úr Íslandi fekk útróðrarbáturin Jøkul úr Klaksvík fyrr í vikuni ein stóran sjógv.

Sjógvurin breyt fyri sær, nógv brotnaði burtur av skansaklædninginum, skrivar Norðlýsið. Umframt brotnaði eisini ein lúka, og hetta gjørdi, at nógvur sjógvur kom í skipið.

Eisini tók sjógvurin nógv av línu við sær fyri borð, og kom nakað av línu um skrúvuna. Var maskinan steðgað, kundi verðið heilt galin endi.

Sent varð út neyðarkall, og varð vaktarskipið Tjaldrið sent til hjálpar. Jøkul varð sleipaður inn á Klaksvíkina.

**hj.**

# Stovna hvala- og kópafelagsskap

*Mikudagin 9. september byrjar í Havn stovnandi fundur av samgongu millum Grønland, Ísland, Føroyar og Noreg um umsiting og gransking av hvali og kópi í okkara parti av heiminum*

Komandi vikuna koma umboð fyri framstandandi fjølmiðlar uttan um okkum – frá BBC og Daily Telegraph umframt danskar, norskar og japanskar miðlar at vera til staðar, tá nýggi felagsskapurin NAMMCO verður stovnaður. Navnið á felagsskapinum er stytting av North Atlantic Marine Mammals Commission – á føroyskum nevndin fyri hvali og kópi í Norðuratlantshavi.

Umframt fjølmiðlaumboðini verða eisini cygleiðarar við úr Kanada, Japan, Russlandi og Norðurlanda Ráðharraráðnum, eins og fleiri felagsskapir í Norðuratlantshavi, ið hava áhuga í at gagnnýta hvala- og kópastovnar, vera við.

Tað verður John Petersen, landsstýrismaður við fiskivinnumálum, ið fer at leiða føroysku sendinevndina á stovnandi fundinum.

At hesin fundur verður hildin í Havnini, verður í landsstýrinum tulkað sum stór virðing fyri føroyingum í millumtjóða samstarvi.

Við eygleiðarum og felagsskapum verða tilsamans yvir 40 almenn umboð við á fundinum, umframt eitt nú føroyskar grindaformenn.

Fundurin heldur fram til fríggjadagin 11. september, og tá verður eisini ein endaligur útgreinandi tíðindafundur hildin.

**hj.**

## Vestfalskyrrindi

3. september: Fyrra kvarter
9. september: Mánin longst frá jørðini
12. september: Fullmáni

| Dato | Suðuroyar-/ Vágsfirði fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. | sp. | Skúvoyarfirði/ Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. sept | 0237 | 1501 | 0437 | 1701 | 0052 | 1316 | 0252 | 1516 | 0137 | 1401 | 0152 | 1416 |
| 6. sept | 0326 | 1549 | 0526 | 1749 | 0141 | 1404 | 0341 | 1504 | 0226 | 1449 | 0241 | 1504 |
| 7. sept | 0413 | 1635 | 0613 | 1835 | 0228 | 1450 | 0428 | 1650 | 0313 | 1535 | 0328 | 1550 |
| 8. sept | 0457 | 1719 | 0657 | 1919 | 0312 | 1534 | 0512 | 1734 | 0357 | 1619 | 0412 | 1634 |